

www.oljan.fo

**Jan Müller** 02 - 07 - 2012

# Statoil aftur funnið stóra oljukeldu

Norska Statoil hevur aftur funnið eina nýggja stóra oljukeldu á norska landgrunninum. Hetta upplýsir felagið í morgun. Talan er um King Lear leitimiðið, beint norðan fyri risaoljukelduna Ekofisk. Tað er Maersk Gallant boripallurin, sum hevur rakt við stóru gass og kondensatkelduna. Total er eisini partur av hesum stóra fundinum, sokallað high impact, sum er tað áttanda á rað, sum Statoil hevur gjørt sum fyristøðufelag seinastu 15 mánaðirnar. Mett verður at oljukeldan goymir millum 7o og 200 milliónir tunnur av olju/gassi. Leitistjórin hjá Statoil á norska landgrunninum, Gro Gunleiksrud Haatvedt sigur, at felagið hevur leingi havt eyguni eftir hesum økinum og prógvar fundið, at norski landgrunnurin framvegis er sera áhugaverdur og týdningarmikil. Nú trýstið og hitin í brunninum er sera høgt hevur Statoil lagt sera stóran dent á sjálva boringina og tryggja sær, at hon hevur livað upp til øll trygdar- og umhvørviskrøv. King Lear-fundið er eitt sera gott íkast til strategiiina hjá Statoil samtakinum um at finna oljukeldur á norska landgrunninum við høgari góðsku. King Lear liggur umleið 20 kilometrar norðan fyri Ekofiskkelduna. Tað er hugvekjandi, at tað ber til at gera stór nýggj fund í tí annars mest virkna partinum av norska landgrunninum, beint við síðuna av tí største oljufundinum, sum nakrantíð er gjørt á landgrunninum, Ekofisk, sigur Haatvedt. Tað styrkir trúnna uppá, at nógv olja framvegis liggur goymd í undirgrundini á norska landgrunninum, sum ikki einans hevur eina áhugaverda fortíð, men eisini eina spennandi framtíð, sigur hon. Statoil fer nú undir at bora avmarkingarbrunnar eins og bora aðrar leitibrunnarí ymsu loyvunum. Nú fer Statoil so at kanna, um oljukeldan skal byggjast út sjálvstøðugt ella um hon skal knýtast í verandi undirstøðukervið í økinum. King Lear-funnet er áttanda high impact fundið, sum Statoil hevur gjørt í got tog væl eitt ár. Hini eru Zafrarani og Lavani í

Tanzania, Skrugaard og Havis í Barentshavinum, Johan Sverdrup í Norðsjónum og Petegrino í Brasil. er det åttende high impact-funnet som Statoil har gjort de siste 15 månedene. De andre er Zafarani og Lavani i Tanzania, Skrugard og Havis i Baretshavet, Johan Sverdrup (tidligere Aldous/Avaldsnes) i Nordsjøen, og Peregrino Sør og Pão de Açúcar (der Statoil ikke er operatør) i Brasil. High impact fund merkir ein oljukelda, sum goymir meira enn 250 milliónir tunnur av olju/gassi, ella ein Statoil lut, sum telur meira enn 100 milliónir tunnur. Vert er at hava í huga, at Brugdan, sum Statoil borar í Føroyum er eisini ein sokallaður "high impact" brunnur. Nú felagið hevur verið so heppið og dugnaligt við hesum slagnum av brunnum, eiga føroyingar bara at vóna, at sigursgongdin hjá norska oljufelagnum heldur fram um okkara leiðir eisini. Kelda - Statoil og Aftenbladet.no

